VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi, um kvøldið veksur hann vindin upp í storm. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 4 og 7 stig.



Veðrið leygardagin:
Stormur av norði og landnyrðingi og ælingur, partvís kavi, men onkur sólglotti. Hitin millum 1 og 4 stig.



Veðrið sunnudagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og norði og sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitalagið millum frostmarkið og +3 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og sólglottar, men eisini kavaælingur. Hitalagið millum -2 og +2 stig.

UBI vann Ungt Virkið

Ársins bólkar í Ungt Virkið kappingini hava seinastu tveir dagarnir víst sína vøru fram á torginum í SMS, og vinnarin í ár gjørdist bólkurin UBI

Ubi er stutt sagt ein fjarstýring og ein lyklaringur. Lyklaringurin verður heftur á eitt nú lyklarnar, mappuna ella aðrastaðnis. Tá ið eitt nú mappan er burtur, sleppur ein við hesum undan stríðnum at leita, tí ein kann "bippa" tað fram. Ein skal trýsta á knøttin á fjarstýringini, og so fer lyklaringurin á burturmista tinginum at ringja.

Hóast hetta ikki er fyrstu ferð, at heimurin hevur sæð ein slíkan lyklaring, so hildu dómararnir í kappingini kortini, at hetta var so mikið gjøgnumført, at tað skuldi gerast ársins hugskot 2010.

Jeannet Djurhuus er ein teirra, ið manna bólkin Ubi.

- Vit fara avgjørt at fylgja hesum hugskotinum upp, og stovna eitt veruligt partafelag og føra hugskotið víðari, sigur hon.

Bólkurin skal í næstum til Danmarkar, har kappast skal í norðurlendskari kapping fyri ungar íverksetar.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-5
Nuuk	-3
Qaqortoq	-1
Ammassalik	-4
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	6
Seyðisfjørður	1
Tórshavn	7
Lerwick	7
Aberdeen	7
London	10
Tromsø	-1
Bergen	6
Oslo	3
Stokkhólm	3
Keypmannah.	9
Helsinki	0
Moskva	2
Berlin	12
Warzawa	13
Kiev	10
Bukarest	12
Paris	14
Madrid	17
Róm	18
Malorca	16
Athen	17
Malta	15
Tunis	20
Beijing	11
New Dehli	35
Bangkok	34
Jakarta	32
Sydney	--
New York	9
Miami	21
Los Angeles	17
Meksikobýur	22
Panama	33
La Paz	15
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	27

LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



Síðstu nátt:
Eitt lágtrýst, 990 hPa. sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað og grynnist. Brúgvalagið norðan fyri Føroyar stendur somuleiðis í stað.

Komandi nátt:
Lágtrýstið yvir Bretsku Oyggjunum fer norðureftir og gevur vaksandi vind á okkara leiðum.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 23/03 kl. 06⁰⁰ – 24/03 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,3°
Minsti hiti máldur í mars: -11,0° -
Mesti hiti máldur í mars: +11,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 4,0 mm – mált frá 23/03 kl. 06⁰⁰ – 24/03 06⁰⁰.
Avfallið higartil í mars: 85 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

VESTFALLSKYRRINDI

23. mars	Fyrra kvarter
28. mars	Mánin næstur jørðini
30. mars	Fullmáni

Kelda: Almanakkin 2010

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
25. mars	02:20	14:46	01:20	13:46	01:35	14:01	04:20	16:46	05:20	17:46	00:35	13:01	-	12:01	02:35	15:01	03:35	16:01	02:05	14:31	03:20	15:46
26. mars	03:12	15:36	02:12	14:36	02:27	14:51	05:12	17:36	06:12	18:36	01:27	13:51	00:27	12:51	03:27	15:51	04:27	16:51	02:57	15:21	04:12	16:36
27. mars	04:01	16:25	03:01	15:25	03:16	15:40	06:01	18:25	07:01	19:25	02:16	14:40	01:16	13:40	04:16	16:40	05:16	17:40	03:46	16:10	05:01	17:25
28. mars	05:49	18:11	04:49	17:11	05:04	17:26	07:49	20:11	08:49	21:11	04:04	16:26	03:04	15:26	06:04	18:26	07:04	19:26	05:34	17:56	06:49	19:11
29. mars	06:34	18:58	05:34	17:58	05:49	18:13	08:34	20:58	09:34	21:58	04:49	17:13	03:49	16:13	06:49	19:13	07:49	20:13	06:19	18:43	07:34	19:58